# Creamy – eitt fyribrigdi í donskum tónleiki

TÓNLEIKUR
*Birgir Kruse*

Ein summardag í fjør komu tvær gentir inn á gólvið hjá plátufelagnum RecArt Music, ógvuliga smædnar. Hóast hetta, vildu tær hitta stjóran, her og nú. Tær høvdu nakrar sangir, sum hann skuldi hoyra. Saman við framleiðarunum »Darwich & Garcia« høvdu tær fest á band fimm sangir. Hetta vóru sangir, sum vóru ógvuliga vælumtóktir millum børn – »Æblemand« var ein teirra. Stjórin í plátufelagnum – sum aldri áður hevði havt vitjan av so ungum stjørnum – var upp í loft beinanvegin. Innan eitt samdøgur var umliðið høvdu tær báðar genturnar ein plátusáttmála. Nú byrjaði eitt spennandi ævintýr, har høvuðsinnihaldið er at Creamy eftir einans fýra mánaðum kundi breggja sær av at verða ársins mest selda fløga í Danmark, og at tær báðar Rannvá og Rebekka fingu eina Grammy-virðisløn fyri ársins bestu barnaútgávu. Creamy er yngsta navn, ið nakrantíð hevur fingið hesa virðisløn.

Restin er søga, sum tey plaga at siga úti í stóru verð. Men tó, Creamy – tað



er Rannvá og Rebekka – halda á. Eftir metsølu av fyrstu fløguni, vóru tær at hoyra víða hvar í summar, tá tilsamans 700.000 áskoðarar hoyrdu tær. Millum annað á sonevndu »Grønu koncertunum« og tiltakinum »Åh Abe«.

Creamy er higartil best eydnaða tiltak av sínum slag, um ein kann nevna hetta eitt tiltak. Og kanska er tað ikki so løgið. Teirra útstráling, scenuapearance og image sum tey siga í bransjuni, og røddir teirra eru nakað heilt fyri seg. Teirra framførsla á palli er á altjóða støði, sum eisini kundi staðfestast í sjónvarpssendingini »Musikbutikken« hjá Keld Heick síðsta leygarkvøld á DR1. Eftir ætlan sendir Sjónvarp Føroya júst hesa sending við Creamy í kvøld.

Men kann ein blíva við at syngja barnasangir? Báðar genturnar í Creamy eru nú 14 ár. Stóri áhoyraraskarin fyrst og fremst í Danmark, men eisini her heima, bíðar ótolin eftir nýggjum sangum. Og fyrradagin bragdaði. Tá kom nýggja fløgan »We got the time«. Jú, tolin trívst. Í staðin fyri at velja hin løttu og kanska mesta uppløgdu leiðina – nevniliga at geva út »Børnehits 2« – hava tær báðar í Creamy og fólkini kring tær, í staðin valt at spæla inn 10 heilt nýggjar og upprunaligar sangir, sum eru á enskum. Umframt hesar 10 sangir, sum eru skrivaðir til hesa útgávu, eru 2 aðrir og áður kendir sangir tiknir við. Sonevndar »cover-versiónir«. Tað snýr seg um Walkers-klassikaran hjá Torben Lendager »Little Kitty« og sangin »Never Ending Story«, sum Limahl sang í filminum við sama navni. Hesin filmur bygdi á søguna hjá Michael Ende. Og nú vit eru við filmin, so er komin nýggjur teknifilmur, har Creamy ger vart við seg. Har syngja tær báðar titulsangin »Help, I'm A Fish«, sum júst er ein av sangunum á nýggju fløguni.

Sum stakfløga er hann longu seldur í 15.000 eintøkum. Filmurin, sum á donskum nevnist »Hjælp, jeg er en fisk« fær góð ummæli og verður í hesum døgum sýndur í fleiri londum. Tá Rannvá og Rebekka høvdu sungið henda sangin, gjørdu tær av, at nýggja fløga teirra skuldi haldast í sama stíli. Tískil eru allir barnasangir nú lagdir á hillina. – Vit eru jú 14, sum tær siga.

Stílurin á nýggju fløguni er Happy Dance. Soleiðis. Right on. Sangirnir eru fyristílaðir av ymsum kendum fólkum so sum Hartman & Langhoff, kendir frá bólkinum Aqua, Hitsville, sum er eitt kent navn, tengt afturat A-Teens og so Dean, ið er kendur frá Me & My.

Nýggju sangirnir frá Creamy eru útvarpsvinarligir »oyrahangarar« tey rópa. Sangir, sum fanga og sum allarhelst verða at hoyra víða hvar. So nú rópa tær báðar Rannvá og Rebekka í Creamy varskó. Vit koma í oyrini á tykkum – og har verða vit hangandi!

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið





**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum regn. Um kvøldið minni vindur. Hitin millum 4 og 7 stig.





**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norðl og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.





**Veðrið mánadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norðl og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin stívt andøvsgul av norði, seinni lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig. Mikudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 9 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 22 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | – |
| Sydney | – |
| New York | 13 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ





Eitt lágtrýst, 983 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landsynning og brúgvalagið haðani verðu yvir Føroyum leygardagin.





Lágtrýstið við Írland stendur mestsum í stað. Hátrýstið við Hvarvið fer spakuliga eystureftir og verður væntandi við Føroyar týsdagin.

### HITALAGIÐ





Hitalagið mált frá 09/11 kl. 06[00]–10/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,1°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALL





Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/11 kl. 06[00]–10/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 39,8 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. nov. | 05:05 | 17:27 | 04:05 | 16:27 | 04:20 | 16:42 | 07:05 | 19:27 | 08:05 | 20:27 | 03:20 | 15:42 | 02:20 | 14:42 | 05:20 | 17:42 | 06:20 | 18:42 | 04:50 | 17:12 | 06:05 | 18:27 |
| 11. nov. | 05:48 | 18:08 | 04:48 | 17:08 | 05:03 | 17:23 | 07:48 | 20:08 | 08:48 | 21:08 | 04:03 | 16:23 | 03:03 | 15:23 | 06:03 | 18:23 | 07:03 | 19:23 | 05:33 | 17:53 | 06:48 | 19:08 |
| 12. nov. | 06:28 | 18:47 | 05:28 | 17:47 | 05:43 | 18:02 | 08:28 | 20:47 | 09:28 | 21:47 | 04:43 | 17:02 | 03:43 | 16:02 | 06:43 | 19:02 | 07:43 | 20:02 | 06:13 | 18:32 | 07:28 | 19:47 |
| 13. nov. | 07:07 | 19:26 | 06:07 | 18:26 | 06:22 | 18:41 | 09:07 | 21:26 | 10:07 | 22:26 | 05:22 | 17:41 | 04:22 | 16:41 | 07:22 | 19:41 | 08:22 | 20:41 | 06:52 | 19:11 | 08:07 | 20:26 |

3. nov.: Mánin longst frá jørðini
4. nov.: Fyrra kvarter
11. nov.: Fullmáni
14. nov.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Skipalistin 2000


Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Antennu-monteringar
Vit avgreiða allar antennumonteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
J. Broncksgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 • Havn
Tlf. 319544

Sig tað uttan rokning





petur & petur • 320870
Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.
Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...
FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo